# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# FØTUR UNDIR EGIÐ BORÐ

»Hvørt ár leigar tað almenna seg inn í bygningar fyri næstan 40 milliónir krónur«. Soleiðis skrivaðu vit í blaðnum mikudagin, eftir at vit høvdu fingið innlit í næstan 100 leigusáttmálar hjá tí almenna.

Tað hevur so mangan verið frammi, hetta at tað almenna átti at bygt ella keypt bygningar, heldur enn at leiga í dýrum dómum bygningar, sum ofta eisini eru illa egnaðir til endamálið. Tað var Høgni Hoydal, løgtingsmaður fyri Tjóðveldi, sum í januar mánaði spurdi Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharra, hvussu nógvar pengar tað almenna brúkar til húsaleigu.

Og svarið er ikki sørt áhugavert: Seinastu 11 árini hevur landið leigað fyri tilsamans 300 milliónir krónur - og talið er nærum tvífaldað seinastu tíggju árini. Tað ber sjálvandi ikki til at siga, at tað almenna als ikki skal leiga, men alt við máta. Ímynda vit okkum, at helmingurin av hesum pengunum, 150 milliónir krónur um árið vórðu brúktar til at byggja ella keypa bygningar til tað almenna, so hevði tað alemnna fyri tað fyrsta hýst sínum stovnum nógv bíligari, samstundis sum byggivinnan hevði fingið nógv meira arbeiði - sum serliga í hesum døgum hevði verið sera passandi.

Vit kunnu so bara spyrja, hví støðan er sum hon er. Tað a byggja bygningar er nakað, sum mydnugleikarnir ikki hava hildi nógv um. Ikki ein gong eitt tinghú vildi løgtingið byggja, tí tað skuld blíva for fint og dýrt. Og staðseting av stovnum er eisini eitt mál, sum blóðið hjá tingfólkum í kók.




Vit hava sæð síðstu árini - nú landsstýrisfólk hava fingið størr heimildir – at almenni stovna hava verið fluttir úr Havnini í óðum verkum. Her skal ikki vera sagt, at hetta ikki kann gerast, men tá tað er gjørt, so er tað gjørt í óðum verkum, tí um hetta var fyrireikað alment, so hevði onkur lagt fót, so einki skuldi hent. Tað vísir seg, at tað er lættari hjá einum landsstýrisfólki at flyta ein stovn úr Havnini út á bygd, enn tildømis at etablera ein stovn væl og virðiliga í Havnini við at byggja ella keypa ein bygning.

Tann stundin er helst komin, at tað almenna fær sær føtur undir egið borð. Samfelagsbúskaparliga hevði tað uttan iva verið skilagott, at landið bygdi sær síni egnu hús at hýsa sær sjálvum.

## Stovnar er fluttir út á bygd í óðum verkum

# Rasmus Seebach øskufastur

Eftir ætlan skuldi Rasmus Seebach verða gestur í Hvonn Live sendingini hjá Rás2 í kvøld og í REX, men vegna øsku úr Íslandi er eingin flúgving til Føroya í dag, og tískil er vitjanin fyribils útsett.

Um flogferðslan kemur aftur í rætt lag í kvøld ella í morgin tíðliga, so verður skráin tann sama í annaðkvøld. Í kvøld verða Kim Hansen við manning í REX.

*barbara@sosialurin.fo*

Øskan úr Íslandi ger aftur um seg, og tískil verður Hvonn Live sendingin hjá Rás2 í kvøld útsett til í morgin klokkan 19-21. Umframt at verða gestur í Hvonn Live, skuldi Rasmus Seebach eisini undirhalda í REX, men bæði hesi tiltøkini eru útsett til í morgin.





## Er public service fyri øll?

HELENA DAM Á NEYSTABØ
KJAK Á SÍÐU 15



## Ov nógvir høvdingar

KÁRI Á RÓGVI
KJAK Á SÍÐU 16



# Sambandinum vantar samband

Tað tykiskt ikki, sum um fyrrverandi og núverandi toppur í Sambandsflokkinum hava nógv samband. Edmund Joensen sóknast í lesarabræv í blaðnum í dag eftir, hvat Kaj Leo Johannesen heldur um stjórnarskipanararuppskotið. Edmund Joensen vísir á, at endamálið við stjórnarskipanaruppskotinum er at lirka loysingina inn gjøgnum bakdyrnar. Hann finst eisini at fjølmiðlunum, sum lítið og einki hava gjørt við hetta málið eftir hansara tykki.

Tað var ikki gamalt, at tingmenn fóru í bløðini at finnast at sínum egnu – og serliga ikki eftir sínum egna formanni. Men hetta er í dag gerandiskostur, og hóast tað tykist sera margháttligt, so vísir Edmund Joensen á eitt tíðindaskriv frá Kaj Leo Johannesen, sum hann sendi út fyri 23 døgum síðani. Í hesum tíðindaskrivi segði Kaj Leo Johannesen, at »ein komandi føroysk stjórnarskipan má virða ta støðu, sum Føroyar hava í ríkisfelagsskapinum« – og at hann fór at spyrja Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharra, hvat hann helt um hetta.

Eftir øllum at døma hava Edmund og Kaj Leo ikki tosað saman síðani 14. apríl – hóast teir eru í sama flokki, sum eisini stjórnar landinum – og fyri sovítt eisini ríkinum.

Slíkst sást ikki, tá floksformenn vóru menn sum Atli Dam, Erlendur Patursson ella Pauli Ellefsen. Men Edmund Joensen kom sum floksformaður í ta óhepnu støðu sjálvur at verða feldur sum floksformaður, og tað er kanska ein Uriaspostur, sum Kaj Leo Johannesen situr í, har hann er bossur hjá trimum fyrrverandi løgmonnum, Edmund, Anfinn og Jóannes...

*eirikur@sosialurin.fo*

Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Jaspur Langgaard
jaspur@sosialurin.fo